Útboð – Keyp av persónbili til Almannaverkið

Almannaverkið tørvar 2 til 3 nýggjar persónbilar í tí, sum verður nevnt „Golf-klassa".

Niðanfyri eru treytirnar fyri hvønn einstakan bil ásettar.

Treytirnar eru hesar

- Bilurin skal kunna flyta 2–4 vaksin á tryggan og góðan hátt.
- Bilurin skal nýtast til koyring millum bygdir í øllum veðri, og tí skal hann vera væl egnaður til føroysk koyrilíkindi. Dentur verður lagdur á motorkraft, koyrieginleikar og trygd.
- Bilurin skal vera el-drivin.
- Bilurin skal hava automatisk gear.
- Bilurin skal hava WLTP á í minsta lagið 400 km.
- Støddin á bilinum skal vera samanberilig við „Golf-klassan".
- Bilurin skal hava minst 4 hurðar.
- Bilurin skal hava bakkikamera og parkeringssensorar.
- Bilurin skal verða latin Almannaverkinum í seinasta lagi í januar 2027. Veitarin skal upplýsa væntaðu veitingartíðina.
- Bilurin skal hava ein neutralan lit, sum t.d. koksgrátt ella myrkagrátt. Svart ella hvítt kann eisini bjóðast, men kann verða mett lægri.
- Almannaverkið krevur, at veitarin hevur eitt góðkent verkstað, tá ið tørvur er á eftirliti ísv. garanti.

Tilboðið skal innihalda

- Lýsing av bilinum.
- Tekniskt dátublað.
- Tilboðsgevarin skal fylla út viðfesta tilboðsskjalið við prísi uttan og við mvg.
- Upplýsingar um garanti og serviceintervall
- Væntaða veitingartíð.

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini og somuleiðis ikki at taka av nøkrum av teimum.

Fær Almannaverkið í sambandi við hesa útbjóðing tørv á fleiri bilum av sama slagi, tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar frá vinnandi veitara, uttan at nýtt útboð verður gjørt. Megnar vinnandi veitari ikki at veita teir 2 til 3 bilarnir innan ásettu veitingartíðina, tilskilar Almannaverkið sær rætt til at taka av næstbesta tilboðnum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keyparanum. Niðurstøðan um, hvat tilboð – um nakað – verður tikið av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á niðanfyri nevndu viðurskifti.

Almannaverkið ynskir at kunna royna bilin, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bilin, ið gevur besta lutfallið millum prís og góðsku. Almannaverkið kann tó velja ein dýrari bil, um mett verður, at hann gevur eina betri loysn við atliti at endamáli, góðsku og rakstri.

Tilboðini verða vektað soleiðis

- Prísur – 60 %
- Egnaður til endamál – 20 %
- Góðska – 20 %

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um útboðið og tilboðsgrundarlagið. Spurningar skulu, so vítt gjørligt, verða settir skrivliga.

Spurningar skulu sendast til rogi@av.fo.

Tilboð skulu latast Almannaverkinum inn umvegis rogi@av.fo í seinasta lagi hósdagin 5. november 2026 kl. 24.00.